## Angela og Hannebal í Føroyahúsinum

Komandi leygardag klokkan 15 fara barnavinarligu Angela og klovnurin Hannebal at undirhalda við barnatiltakið í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Angela Petersen og Rúni Gaardlykke hava nógv ár á baki, og sjálvt um tey eru at síggja í føroyskum sjónvarpi hvørja viku við sendingini Krutl, so sæst tað eisini á netinum: www.olivant.fo/?page=svf. Meiri kann lesast á: www.myspace.com/foinvasion



## Argjalega í Nesvík

Aftur í ár verður møguleiki hjá argjafólki at taka lut á Aftur í ár verður møguleiki hjá argjafólki at taka lut á Argjalegu í Nesvík. Legan verður vikuskiftið 11.-13. apríl. Ymist verður á skránni. Tríggir fyrilestrar verða hildnir, ein fríggjakvøldið og hinir leygarmorgun og seinnapartin leygardagin. Sólbjørg Símunarson fer at tosa um strongd, Martin Joensen lív sítt, og John Myllhamar kemur at tosa og vísa myndir um vanlukkuna við sinnopsgassi, ið honum var fyri umborð á »Heldarstindi«. Frítíðaraktivitetur og veitslukvøld verða eisini á skránni. Tekning fer fram á tlf. 315870 ella á e-posti: alfredh@post.olivant.fo innan 6. apríl.

# Gud fer ongantíð

**Á gudstænastuni í Dómkirkjuni sunnudagin verður 31 ára gamla Ann D. Hansen prestvígd. – Hjá Gudi hava vit øll eitt óendaligt virði. Vit kunnu altíð líta á, at hann tekur sær av okkum í øllum lívsins viðurskiftum, sigur nýggi presturin. Heilt frá tí hon var smágenta, hevur hon ætlað sær at gerast prestur. Nú gerst dreymurin umsíðir veruleiki**



PRESTVÍGSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Dómkirkjan:** - Álit á Gud, - tað er í øllum førum tað, sum altíð fer at liggja undir mínum prædikum, sigur Ann.

Sunnudagin verður hon prestvígd í Dómkirkjuni, og fer tá at virka sum ein av prestunum við tær fýra kirkjurnar í Suðurstreymoyar Eystara Prestagjaldi – Dómkirkjuna og kirkjurnar í Hoyvík, Nólsoy og í Kaldbak.

Ann byrjar í starvinum 1. apríl og verður í tí til hálvan august. Hetta er starvið hjá Marjun Lómaklett, sum er í longdum barnsburðarfarloyvi.

Høvuðsarbeiðið hjá nýggja prestinum verður sjálvandi við tær kirkjuligu tænasturnar, herundir prædikurnar. Og boðskapin í teimum er hon ikki eina løtu í iva um:

- Vit kunnu altíð líta á, at hann tekur sær av okkum óansæð hvørji vit eru og í hvørjari støðu, vit eru í. Tað hevur sjálvur sagt, og tí er tað soleiðis, sigur 31 ára gamla Ann, og vísir til frásøgnina um fótasporini í sandinum, sum greitt verður frá aðrastaðni á síðuni.

Hon hevur lisið gudfrøði sum sjálvlesandi við Århus Universitet, er gift og er búsitandi á Tinghúsvegnum í Havn saman við manni og trimum døtrum.

### Prædikaði fyri dukkunum

Nú Ann verður prestvígd sunnudagin, eru gudstænastan, kirkjan og andaliga lívið als ikki ókent fyri tann 31 ára gamla prestin.

- Eg havi faktiskt altíð gingið í kirkju – og tað hevur mær dámt sera væl, greiðir Ann frá.

At hon skuldi gerast prestur ein dag, hevur hon droymt um, so langt hon kann minnast aftur í tíðina.

Hon hevur í roynd og veru altíð vitað tað, og hevur somuleiðis í verki - og spæli! - víst, at hetta varð leiðin hon ætlaði at fylgja seinni í lívinum.

- Ja, eg minnist at eg plagdi onkutíð at seta stólar upp heima við hús og spældi at teir vóru kirkjubeinkirnir. So prædikaði eg fyri dukkunum og ímyndaði mær soleiðis, at tær vóru kirkjufólkið.

- Eg haldi, at tær lurtaðu væl eftir, sigur Ann við einum brosi.

### Dámar at prædika

Tá hon sum tannáringur fór í 8. flokk í Kommunuskúlanum, var tað somuleiðis hetta starvið, sum lá henni fremst í huganum – og áhugin fyri starvinum gjørdist ikki minni, tá hon síðani fór undir miðnámslesturin sum studentur í Hoydølum.

Tá hon gekk í framhaldsdeildini tók hon enn eina avgerð á leiðini fram ímóti starvinum, sum hon verður vígd til sunnudagin: Hon avgjørdi at fara í starvsvenjing hjá Kjartani Mørkøre sum tá var prestur í Vesturkirkjuni.

Hetta var ein sera áhugaverd venjing fyri ta ungu Ann, tí hon samstundis kom at arbeiða saman við táverandi biskupi, Hans J. Joensen og táverandi dómprósti, Petur Martin Rasmussen.

- Teir høvdu helst ikki roynt áður at hava ein næming í starvsvenjing – og serliga ikki eina unga kvinnu. Men teir tóku sera væl ímóti mær, minnist Ann afturá.

Tá hon fór í studentaskúla, slepti hon ikki endanum, men helt fram á somu leið, og hevði av og á andaktina, sum varð fyriskipað á skúlanum eina ferð um vikuna.

- Eg veit ikki rættiliga hví, men mær hevur altíð dámt væl at prædika og at boða Guds orð, sjálvt um tað ikki beinleiðis liggur til mín, sigur hon, og avdúkar í hesum viðfangi, at hon er eitt sindur smæðin av lyndi.

### Eitt lív í yvirflóð

Hóast Ann fyrst verður prestvígd sunnudagin, hevur hon longu roynt seg sum talara fleiri ferðir.

Hon hevði millum annað eina prædiku í Vesturkirkjuni í heyst, tá hon aftur var í starvsvenjing her – hesaferð í sambandi við pastoralseminari'ið. Hesa prædikuna dámdi fólki so mikið væl, at Sosialurin varð biðin um at prenta hesa í blaðnum.